# Íslendskt bryggjarí høvuðsstuðul hjá Jóansøkufestivalinum

FESTIVALUR

Jóansøkufestivalurin og íslendska bryggjaríið Vífilfell skrivaðu fríggjadagin undir avtalu, sum førir við sær, at Vífilfell verður høvuðsstuðul á Jóansøkufestivalinum 2006.

Vífilfell er størsti sodavatnsframleiðari í Íslandi. Síðan 1942 hevur Vífilfell, sum ein tann fyrsta fyritøkan í Evropa, havt avtalu við Coca-Cola um at tappað Coca-Cola, Fanta, Sprite og aðrir sodavatnsdrykkir hjá Coca-Cola samtakinum. Umframt sodavatn, so framleiðir Vífilfell eisini nógvar aðrar drykkir m.a. eisini Svali, sum føroyingar jú kenna sera væl. Vífilfell bryggjar eisini øl og kennast flestu føroyingar eisini við øl'ina Víking, sum eisini er mest selda øl í Íslandi.

Guðjón Guðmundsson, Marknaðar- og Sølustjóri á Vífilfell sigur, at Vífilfell altíð hevur lagt stóran dent á at verða við í menningini av mentunar- og tónleikatiltøkum sum t.d. Jóansøkufestivalinum. Ikki minst er Jóansøkufestivalurin áhugaverdur fyri okkum, tí talan er um ein tiltak, sum røkkir út um landoddarnir í Føroyum, sigur Guðjón Guðmundsson.

# Regin Hammer umboðsmaður hjá DONG

OLJUVINNA

Tíðindaskriv

Oljufelagið DONG hevur útnevnt Regin Hammer til umboðsmann fyri felagnum í Føroyum. Í næstum letur DONG eisini upp lítla skrivstovu í Gongini í Havn, í sama bygningi sum onnur oljufeløg (Atlantic Petroleum, Amerada Hess og Geysir) fara at húsast.

Regin Hammer hevur áður í fleiri ár arbeitt hjá DONG á høvuðsskrivstovuni í Hørsholm. Seinastu trý árini hevur Regin arbeitt sum umsitingarleiðari fyri Føroya Oljuídnaðarbólk (FOÍB), sum er samtakið av øllum oljufeløgum við leitiloyvum í Føroyum.

DONG er eitt av mest virknu oljufeløgunum á Atlantsmótinum, og fer felagið at luttaka í fleiri leiti- og avmarkingarbrunnum í hesum øki í ár og næsta ár. Á Føroyskum øki luttekur DONG í 4 leitiloyvum: 001, 006, 008 og 009. DONG luttekur tískil í boringini á Brugdu-prospektinum sum verður í summar.



– Í langtíðarætlanini hjá DONG verður Atlantsmótið mett sum eitt kjarnuøki, so hetta stig er ein náttúrligur partur av menningini av felagnum, sigur Søren Gath Hansen, stjóri.

**Um fyritøkuna DONG**

DONG hevur júst yvirtikið eina røð av el-feløgum á tí danska marknaðinum, og er nú eitt av størstu orkuveitingarfelagið í Norðurlondum. Umsetningur felagsins í 2005 var 18 milliardir krónur. Fleiri enn 4000 fólk arbeiða hjá felagnum.

Umframt at vera eitt orkuveitingarfelag er DONG eitt virkið leitifelag sum hevur leiti- og framleiðsluvirksemi í Danmark, Noregi, Bretlandi, Føroyum og Grønlandi.


# GITIÐ LEIKARAN



**Vinnið fótbóltsupplivingina Skotland - Førpyar**

ATLANTIC AIRWAYS

***Kappingarreglur***

Frá mánadegnum 3. apríl og í 15 fylgjandi Sosialum verður andliti á einum kendum føroyskum fótbóltsspælara at síggja. Myndin er tó viðgjørd nakað, soleiðis at tað verður truplari at vita, hvør spælarin er.

Á síðu 31 í fótbóltsblaðnum, sum var partur av VikuskiftisSosialinum, eru 15 tómar reglur. Á hesar skulu nøvnini á teimum 15 spælarunum setast.

Tá hetta er gjørt, skal blaðsíðan við nøvnunum sendast okkum. Seinasta freist fyri innlatan er mánadagin 1. mai. Navnið á vinnaranum verður kunngjørt í Sosialinum tann 4. mai.

Minnist til at skriva navn, bústað og telefonnummar á seðilin, sum verður sendir okkum.



Verður avrit av síðuni sent okkum, verður hetta ikki roknað sum gyldugt luttøkuprógv.